# Millum pennin og spakan

Lívið við spaka í hond, ella uppi yvir blandimaskinuni, var ikki altíð líka týdligt. Kortini góvu hesar royndir eitt vet av kjølfestu. Sum rithøvundur vildi ein ikki verið tær fyriuttan



*Útsýni frá torninum í Vesturkirkjuni yvir raðhúsini í J. Patursonargøtu niðan yvir býarpartin »í Grønlandi« og líðirnar niðan fyri Marknagilsvegin:
– Tilsamans arbeiddi eg hjá einum 10-12 ymiskum størri og smærri virkjum, teirramillum eisini eitt nú á Bacalao, Phil & Søn og Lamhauge & Waagstein, sigur Hanus Kamban.
– Hesi árini varð tann nýggja Havnin til. Stoffalág, Rættará, Heyggurin Mikli og líðirnar niðan fyri Marknagilsvegin vórðu lagdar undir betong og asfalt*

ENDURMINNINGAR

*Hanus Kamban*

UPPALARAR OG skúlafólk føra viðhvørt fram ta hugsan, at menniskjans likam og sál eiga at samstarva. Í okkara lítla landi hava vit — kanska serliga í tíðini, eftir at vit fingu almennan skúla — sæð dømir um eina slíka samvinnu.

Tak bara tann gamla føroyska skúlalæraran. Um væl vildi til, kundi ein slíkur lærari vera bæði lesandi, vitandi og skrivandi menniskja. Umframt tað kundi hann, eisini um væl visti til, gagna síni bygd sum eitt nú timburmaður, snikkari, fínmekanikari og bátasmiður. Hann var — í ófullkomnum sniði, treyðugt so — dømi um tað *heila menniskjað*, sum gamli Aldous Huxley plagdi at prædika um.

Sjálvur havi eg altíð hildið hesa hugsjón um áralag millum andaligan og likamligan róður verið sanna. Eins og eitt nú sjómaðurin kennir sakn í ikki at hava kunnleika um t.d. søgu og tí tekur bøkur við sær til Grønlands ella Svalbard, kann hin bókliga menti viðhvørt føla longsul eftir at fáa roðslu á fingrarnar ella mold undir naglarnar.

Tá ið undirritaði á sumri 1956 sigldi úr Skúgvi til Havnar við sluppini *Selnes* — sum eisini førdi ognirnar hjá foreldrum mínum av útoyggj til høvuðsstaðin — var tað sum tráðurin til tann likamliga partin av tilveruni varð slitin. Mínir javnaldrar fóru til skips. Sjálvur steig eg tey fyrstu fetini inn í eitt annað ríki, bygt av anda heldur enn kroppi. Ein lærdi mál og søgu. Ein varð førdur inn í skaldskaparins heim. Men alla tíðina andi onkustaðni í huganum ein órógv, ein kensla av, at okkurt virðismikið var gloppið einum av hondum.

GAMAN Í — sjómaður bleiv ein ongantíð. Kortini hevði verið skeivt at sagt, at likamið púrasta varð slept upp á fjall. Ivaleyst vóru nakrir skúlanæmingar, ið kundu hugsað sær at gingið fyri einki í summarfrítíðini. Men fá foreldur lótu sær lynda, at børnini gingu hendur í favn í tveir mánar. Vit, sum gingu á Preliminer- og Studentaskeið Føroya Løgtings, vóru sostatt syndrað niður yvir tey arbeiðspláss, sum tá vóru í Føroyum. Genturnar stóðu í handlum ella kioskum, bygdadreingir sluppu ein túr í sild ella við hvalabátum.

Hjá havnardreingjum, sum ikki kendu ein skipara ella ein reiðara, vóru aðrir møguleikar. Í seinnu helvt av fimtiárunum blómaði byggivinnan í Havn. Fólk, sum fluttu til Havnar, skuldu hava tak yvir høvdið. Tískil vórðu raðhús bygd bæði í eystur- og vesturbýnum. Hvørt einstakt hús var vanliga í tveimum ella trimum hæddum, við einum lítlum garði øðrumegin og einum túni hinumegin.

FYRSTI ARBEIÐSGEVARI eg starvaðist hjá var Petur í Gong. Lendið frá Revagørðunum og eystur móti Dalatrøðni, var útstykkjað, og Petur í Gong bygdi á hesum stað raðhús, langar lonir við tveimum hæddum. Útgrevstrararbeiðið fyri teimum fyrstu lonunum var fingið frá hondini á sumri 1957, tá eg fór at arbeiða hjá har. Nú varð blandað, stoypt og steytað. Viður var reinsaður og formar settir upp.

Tað tykist at vera lagnan hjá føringum, at í smáum sum stórum viðurskiftum enda teir við at sita og munnhøggast um málsligar spurningar. Komin av bygd ansaði ein straks eftir, at byggivinnan í Havn hevði sítt serliga mál, at *skumpa* æt t.d. at *lempa*, og ein *skupla* æt ein *skovl*. Eg hevði ongantíð hoyrt hesi orðini fyrr og hevði lítlan hug at brúka tey. Eg haldi meg ikki vera ovurhonds erkvisnan málsliga, men eitt mark má vera. Eitt nú havi eg ongantíð orka at tikið orðið ein *kúllingur* í mín munn. Hetta mishátta orð átti at fingið durafjórðingin ongantíð ov skjótt. Tað eitur stutt og greitt *høsnarungi*. Basta!

Eg loyvdi mær at mótmæla. Tað æt ikki ein *skovl*, men ein *skupla*. Men tá varð eg settur væl og virðiliga upp á pláss av einum eldri svíningi, sum gjørdi greitt, at ein skupla var eitt amboð, gjørt úr herðablaðnum á hvali. Maðurin var um tey sjeyti, var væl skorin fyri tungubandið og tosaði ramligt svínoyarmál. Slíkum myndugleika stóð eg ikki kurl. So *skovlin* varð við yvirlutan.

HETTA SUMMARIÐ hjá Peturi í Gong kom eg at kenna ein suðring, hann var eldri maður, undir miðal á vøkstri, stillførur, eitt sindur bogin, við mildum eygum og óvanliga góðvarnum andliti. Maðurin æt, minnist meg rætt, Salomon Djurhuus. Blaðungir dreingir og eldri menn vórðu ofta settir til tað minst krevjandi arbeiðið, at reinsa formar og brettir ella taka seymir út.

Salomon og eg komu at arbeiða saman í longri tíð, kanska fleiri vikur, og sum vera man bleiv eisini prátað. Eg síggi mannin fyri mær, nú meðan eg skrivi, hann er putlutur, eitt sindur seinur, óvanliga nossligur, javnan letur hann seg úr handskunum og skolar hendur og handskar, ivaleyst hevur hann fortreð av sveittaluktinum.

Tað serliga við hesum Salomon var, at hann var ikki bara lesandi maður, men lesihestur. Hann hevði, um meg minnist rætt, verið sjómaður alt sítt lív. At kalla hvørt oyra, hann hevði forvunnið, var farið til bøkur. Eg haldi meg minnast, at hann var ógiftur, haraftrat tóktist hann røkin og pjøkin, so eg kundi rokna út, at har mundi vaksa skjótt í bókarúgvuni. Eyguni vuksu í mær, tá ið hann fortaldi, hvussu mong bind hann hevði sankað saman og lisið. Hansara lív hevði verið eitt slag av lærdum háskúla, har hann var sín egni lærari. Hann hevði lært seg mál, kanska eisini søgu. Men fyrst og fremst hevði hann lagt seg eftir at læra tey neyvu fakini, støddfrøði, geometri, alisfrøði, evnafrøði. Hann reksaði upp alt, hann dugdi og visti, greiddi frá líkningum og formlum. Hann roknaði út fyri mær víddina á himmalrúminum. Eg helt meg duga væl at rokna, men her hevði eg funnið mín yvirmann.

Hvat var í øllum hesum, dugi eg ikki at siga í dag. Salomon fortaldi, at hann í einum føri hevði varnast eitt mistak í eini stjørnufrøðiligari útrokning í álmanakkanum, skrivað til lærda háskúlan í Keypmannahavn, sum hevði givið sær rætt og rættað mistakið í næstu útgávu.

Eg var sjálvsagt bæði ungur og góðtrúgvin. Og onkursvegna tóktist tað tá, sum gekk ein føroyskur Pythagoras her og høsnaðist, við skavara og hamri, gloymdur og forfjónaður. Í dag stendur hann fyri mær sum dømi um mín egna longsul, bara í øvugtun sniði: slitmaðurin, ið toyggir seg eftir anda og vitan. Hann er samstundis ivaleyst dømi um eitt fólkaslag, sum mennist í útjaðara, har øll atgongd til skipaðan lestur er stongd. Slíkir kunnu gerast virdir granskarar, men verða ofta — misrøktir og mismettir av sínum umhvørvi — bara til serskøltar.

Á SUMRI árið eftir fekk eg høvi til fyri fyrstu ferð at arbeiða í fiski. Turkihúsið hjá Karl á Lag stóð sum kunnugt eystan fyri Skansan, ein klombrutur, døkkur kassi. Hellan eystanfyri - har Fiskasølan seinni fór at halda til — varð brúkt til at breiða fiskin á. Fiskaarbeiðið fór helst fram á sama hátt, sum tað hevði gjørt síðani seinast í 19. øld. Mannagongdin var: at vaska, salta, breiða út, vraka og pakka.

Yvir virkinum hjá Karl á Lag var ein kámur farri av tign og varsemi. Mær er sagt, at gamli Karl á Lag skuldi vera ein av teimum fáu, sum dugdi at leggja upp fyri, tá ið kreppan



kom í tríatiárunum, og sum sostatt ikki fór á heysin. Ein sonur hansara, róptur Diaba, hevði verið arbeiðsformaður í tríatiárunum, undir honum høvdu mamma og onnur í hennara ættarliði arbeitt. Diaba var tiltikin dámligur maður, enn í dag hittir ein gamlar konur, sum fáa ljós í eyguni, tá hann verður nevndur. Hesin ljóslynti maður doyði á syrgiligan hátt. Mær er sagt, at hann hevði svomið á sjónum yviri við Strond og aftaná lagt seg at sova í tí kalda turkihúsinum. Hann legðist sjúkur, fekk lungnabruna og doyði.

Jákup á Lag var fattur maður, álvarsamur, ongantíð fagurlátin, men kortini dámligur. Eg haldi meg minnast, at hann var illsintur maður, tó at eg ikki minnist nakra ávísa hending.

Skrivstovan var vinstrumegin inngongdina, í ovaru síðu á turkihúsinum. Inn hagar varð farið lønardag seinast í vikuni. Lønina fekk ein talda upp í ein tunnan, ljósabláan ella ljósagráan brævbjálva.

Tá ið eg í dag hugsi um hesa gerandisligu hending, hevur hon í minninum okkurt rituelt yvir sær, sum vóru tað bønarmenn í Harrans víngarði, ið her fingu samsýning fyri lokið verk. Eg havi somu kenslu, tá eg í dag síggi fólk standa í stórbýnum og taka pengar út úr kortautomatum. Tað er, sum fremja tey okkurt loynt ritual, sum kanska ikki tolir dagsins ljós, við bakinum til, sum vóru tey til altars. Pengar eru í okkara samfelag onkursvegna halgir, vit fara um hesar lutir, sum hava teir sakramentala tign. Kanska hevur Jákup á Lag havt hesa somu kenslu.

At arbeiða í fiski var munandi tyngri og ónossligari enn byggiarbeiði. Ein kendi sjálvsagt til vanligt arbeiði, sum tað fór fram úti á bygd, at hoyggja, bera tøð, velta og saksa. Her var arbeiðsdagurin langur, við áhaldandi, skipaðum arbeiði og fáum og stuttum steðgum. Tann moyri unglingakroppurin skuldi venja seg við nýggjar avbjóðingar. Vanliga varð arbeitt minst til klokkan sjey, ofta bæði til klokkan níggju og tíggju. Ein bleiv sárhentur, deymurin av fiski og salti hekk í kroppinum, á morgni verkti andsperran í hvørjari spong.

Í mínum minni er navnið Camus samantvinnað við turkihúsið hjá Karl á Lag. Albert Camus hevði fingið nobelvirðislønina í 1957, og eg hevði árið eftir keypt eina bók hjá honum, søgusavnið *Útlegd og kongsríki*. Hvørt kvøld aftan á arbeiðstíð lá eg í songini og las, vanliga sovnaði eg av møði niður yvir stavirnar. Um meg ikki minnist skeivt, var ein av søgunum um ein mann, sum arbeiðir í eini veldugari saltgoymslu. Onkursvegna var tað sum saltið úr bókmentaheiminum og tað ítøkiliga saltið hjá Karl á Lag hetta summarið runnu saman í eina eind, sum føldist tung og nívandi, sum vildi tað slúka ein.

HJÁ EINUM sum hevur búð í Havnini í nítiárunum kann tað tykjast merkiligt at lata hugan reika aftur til fimti- og sekstiárini. Hesi seinastu mongu árini hevur tað ikki verið ein sjálvfylgja, at skúlaungdómur fekk arbeiði í frítíðini. Kreppuárini 1992-96 var Havnin mest sum ein oyðimørk. Tá eitt nú Skipasmiðjan er undantikin, hoyrdist hesa tíðina nóg illa eitt hamarsslag í býnum. Í fimti- og sekstiárunum harafturímóti var Havnin øll eitt byggipláss. Ein ikki lítil partur av hesum byggiarbeiði fór fram í miðbýnum.

Arbeiðsgevarar valdast. Lyndi, umstøður og støðd á virkinum hava her sín týdning. Í Havnini vóru ikki heilt fá smávirkir, har arbeiðsgevarin átók sær so pø á pø at stoypa eina trappu, slætta eitt stykki, grava út fyri einum rottanga ella byggja eini sethús. Í slíkum førum kundi arbeiðsgevarin vera hálvgum skrivstovumaður, hálvgum múrari ella timburmaður, sum sjálvur tók lut í arbeiðinum.

Eitt stig longur uppi vóru tey hálvstóru virkini, við kanska fimm ella tíggju arbeiðsmonnum, har arbeiðsgevarin var stjóri, men kortini gekk arbeiðsklæddur og onkuntíð, eitt nú tá á stóð at blanda betong ein leygardag, sjálvur kundi taka eina hond í við arbeiðinum.

Ovast uppi vóru tey eftir føroyskum viðurskiftum stóru virkini. Í einum slíkum virki hevði arbeiðsgevarin slept sambandinum við tann reint likamliga partin av tí organismu, hann hevði ábyrgd av. Hann var nú stjóri, fyriskipari, búskaparligur og fakligur strategur.

PETUR MICHELSEN var ein arbeiðstakari av hesum seinasta slagnum. Hann hevði í árunum undan 1960 og aftaná nógv fólk í arbeiði. Vanliga hevði hann ábyrgdina av einum trimum ella fýra miðalstórum byggitiltøkum samstundis. Tey sumrini, eg arbeiddi hjá honum, bygdi hann m.a. Sjúkrakassan, Havnar Bio og Telegrafstøðina. Samsvarandi hesum noyddist hann at hava einar 3-4 álítandi og dugnaligar arbeiðsformenn.

Tað peningaliga og sosiala stigið, ein virkisleiðari er komin á, er sjálvsagt við til at skapa hansara tignarkenslu, og hetta fær aftur avleiðingar fyri medferð, tosingarlag og klædnabúna. Meðan Petur í Gong, um meg ikki minnist skeivt, vanliga gekk í ketildrakt, ella í jakka og posatroyggju, gekk Petur Michelsen í klædningsjakka og undir hatti. Eg kann hugsa mær, hóast eg einki vist veit um hetta, at kappingin um hetta mundið hevur verið hørð, frá eitt nú uppaftur størri fyritøkum sum Pihl & Søn.



*Petur Michelsen hevði nógv fólk í arbeiði, og hann bygdi m. a. Havnar Bio, sum stóð liðugt á ólavsøku í 1961*

Í hvussu var, yvir Peturi Michelsen var altíð ein farri av fjáltri og órógv. Hann var miðalmaður á vøkstri, kvikgongdur og hvattalandi, at síggja til eitt sindur kýpin, í medferð og vakstrarlag kanska ikki ólíkur tí írska sangaranum Van Morrison, sum eg hevði tann stuttleika at síggja og hoyra á konsert í Falkonersentrinum í fjør heyst.

Petur Michelsen gekk vanliga við eini sigar, sum ongantíð var í friði, eyguni flakkaðu higar og hagar, sum vildu tey vissa seg um, at eingin sat hendur í favn, og at alt fór fram á líkinda hátt. Sá hann, at onkur sat ov leingi og letaðist, ella at arbeiðið ikki varð gjørt, sum fyriskipað var, kundi hann loysa av. Fjúsið var stutt, skortfleingjurnar ógvisligar. Petur Michelsen hevði handilstenn, og einaferð minnist eg hann hava deilt so illa, at hann misti tenninar niður í betongið. Eisini minnist eg hann einaferð hava kallað ein skúladrong, sum arbeiddi hjá honum, *snottunga*. Aftur er tað ivaleyst mítt serliga málsliga viðkvæmi, ið hevur gjørt vart við seg. Eg helt orðið vera óføroyskt, og havi tí varðveitt tað í minninum.

Í øllum menniskjansligum viðurskiftum er altíð eitt ávíst forvitni uppií. Hóast vit, moyrir og óbúnir skúlaungdómar sum vit vóru, so avgjørt hoyrdu heima niðast á tignarstiganum, høvdu vit bæði eygu og oyru. Vit komu at kenna menn úr bý og av bygd, vit skiftu orð um átrúna og politikk, vit gjørdu fortreð og spældu monnum puss. Og sjálvsagt fingu vit eisini eina ávísa vitan um arbeiðstakaran.

Hóast Petur Michelsen var illsintur og sýntist lítið fryntligur, var hann, hugsi eg, virdur og á ein hátt eisini dámdur. Eg visti, at hann sum ungur hevði verið við í fráhaldsrørsluni, og at hann átti onkran sang í fráhaldssangbókini. Hesa vitan fekk eg illa at ríma við tann turrisliga, heldur fjálturstungna stjóran, sum skuldi hava umsjón við sínum ymisku ábyrgdarøkjum. Viðurskiftir, sum eg ikki havi hug at nevna í eini jólahugleiðing, fingu meg at halda, at Petur Michelsen onkursvegna var ein tragiskur persónur.

VIRKIÐ HJÁ Ásmundi Poulsen var eitt av teimum mongu smávirkjunum í Havnini. Hjá honum arbeiddi eg í eitt stytri tíðarskeið mitt í sekstiárunum. Frá grannalagnum í Jónas Broncksgøtu kendi eg bæði Ásmund, konu hansara og







*Tríggir av arbeiðsgevarunum hjá Hanusi: – Jákup á Lag var fattur maður, álvarsamur, ongantíð fagurlátin, men kortini dámligur. Petur Michelsen var stjóri, fyriskipari, búskaparlligur og fakligur strategur, meðan Petur í Gong vanliga gekk í ketilsdrakt, jakka ella í posatroyggju…*